# Avloysarastarv sum skeiðslærari
## á Trygdardeplinum við Áir

**Starvið**
Undirvísing í brunaverju, eldsløkking og roykkaving, til- og avriggan í sambandi við skeið og viðlíkahald av sløkki- og aðrari útgerð.

Tey, ið fáa upplæring í eldsløkking á Trygdardeplinum, eru í høvuðsheitum: sjófólk, sløkkiliðsfólk og starvsfólk á virkjum og stovnum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum maskinmeistari, ella aðra útbúgving, sum kann javnmetast. Umsøkjari, sum eisini hevur útbúgving sum brunaumsjónarmaður, hevur fyrimun. Góður telduførleiki er ein treyt.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevni, vera fyrikomandi, ágrýtin og førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti**
Starvstíðin er 1 ár. Tann, ið settur verður, skal byrja skjótast tilber.

Lønar- og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Maskinmeistaralærarar saman við Fakfelagi Sjómansskúlalærara.

Arbeiðsstaðið er á Trygdardeplinum við Áir, tó kann nakað av undirvísing verða á Vinnuháskúlanum í Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til:
Vinnuháskúlin, Postrúm 104
Nóatún 2, FO-110 Tórshavn.

Umsóknir saman við avriti av prógvum, og møguligum viðmælum, skulu vera Vinnuháskúlanum í hendi í seinasta lagi 2. mars 2007, kl. 1200.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til: Signheðin Davidsen á tel. 422354, ella Hans Johannes á Brúgv á tel. 350242.

KREA.FO · TEL 47 80 80

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstýrelsen og IMO.

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · Nóatún 2 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo




STEPHANSSONS HÚS 314291

# Hevur tú áhuga fyri føroyska vinnulívinum?

***Vil tú vera við til at menna vinnulívið, so tað verður sterkari her heima og á altjóða pallinum?***

**Starvið**
Vit sóknast eftir einum samstarvssterkum fulltrúa til menningardeildina í Vinnumálaráðnum. Tú kemur at taka tær av at menna vinnulívið og lóggávuna á hesum øki.

Arbeiðið krevur gott yvirlit og evni til at halda fleiri bóltar í luftini í senn. Ítøkiligar uppgávur eru í løtuni m.a. einskiljing av Føroya Tele, Atlantic Airways og Føroya Lívstrygging. Yvirtøka og útbygging av flogvøllinum, dagføring av vinnulóggávum og at smíða nýggjar kappingar- og marknaðarføringarlógir.

**Vit ynskja:**
At tú hevur útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. í stjórnmálafrøði, búskaparfrøði ella løgfrøði. Onnur útbúgving kann eisini lúka krøvini. Persónar við viðkomandi royndum frá almennari ella privatari fyrisiting hava fyrimun.

**Vit bjóða:**
Eitt opið, ágrýtið og fjølbroytt starv í einum góðum umhvørvi, sum tú eisini sjálv/ur er við til at skapa, fjølbroyttar uppgávur í tøttum sambandi við vinnulívið, og eitt starvspláss, sum setur høg krøv um at røkka sett mál.

Setanartreytirnar eru eftir sáttmála millum lønardeildina og viðkomandi fakfelag.

Sendið umsóknina innan 26.2 til vmr@vmr.fo ella Postboks 377, 110 Tórshavn.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Vinnumálaráðið.

*Deildin fyrisitur almenna vinnumenning, lóggávu og vinnuligt undirstøðukervi. Herímillum vinnuframamál, ársroknskaparmál, partafelagsmál, gransnkoðanarmál, fjarskiftismál, KT-vinnu, postmál, kappingarmál, marknaðarføringsmál, vega- og havnamál, ferðslu og flogferðslumálkappingar-, ferðavinnu- og menningarmál.*

**VINNUMÁLARÁÐIÐ**
Tinganes, postsmoga 377, 110 Tórshavn, tel. 356060 vmr@vmr.fo